# BÓKASÍÐAN

bøkur, bøkur, bøkur…



Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

## Rushdie í Demokratikanon




*Skaldsøgan "De staniske vers" eftir Salman Rushdie er eitt av umstríddu íkastunum í nýggju Demokratikanonini*

*Demokratikanon*, Undervisningsministeriet, 2008

Gamlir filosoffar, kvinnurørslan, Muhammed-tekningar og ein bretsk-indiskur rithøvundur. Úrvalið er stórt í nýggju demokratikanonini, sum danska Undervisningsministeriet gav út í vikuni – ein kanon, sum skal fáa komandi ættarlið at skilja søguna aftan fyri danska fólkaræðið.

Millum meir umstríddu íkastini í savninum er bókin *De sataniske vers* eftir bretsk-indiska rithøvundan Salman Rushdie. Mikið stríð stóðst av bókini, tí fleiri fataðu hana sum eina háð av islam.

Í grundgevingini fyri at taka *De sataniske vers* við í kanonina sigur nevndin, at Rushdie málið snýr seg um mentanarsamanstoytin millum vesturlendska fólkaræðishugsan og muslimska fundamentalismu.

Í hesum brotinum í bókini verða eisini Muhammed-tekningarnar í Jyllands Postinum í 2006 nevndar, sjálvt um savnið annars ikki skuldi umfata hendingar eftir 2000.

Longu nú verður tó funnist harðliga at nýggju kanonini. Eitt nú vísir søgufrøðingurin Jørgen Carlsen á, at ongin kann vera ósamdur við teimum demokratisku rættindunum, sum nevndin hevur lagt áherðslu á, men at ov lítið verður gjørt burturúr sambandinum millum einstaklingin og samfelagið.

– Hetta sambandið fevnir um nógvar tvístøður og mótsøgnir, sum ongar lættar loysnir eru á, og tað hoyrir eisini við í eini lýsing av fólkaræðinum, sigur Jørgen Carlsen.

**ave**

# Vanlukkan lúrir

**Í nýggju bókini *Mand i mørke* hugtekur Paul Auster við eini søgu um ein mann, sum roynir at doyva sína sorg um kríggj og kærleika við at spinna eina søgu um kríggj og kærleika**

NÝGGJ BÓK
Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

"Eg eri einsamallur í myrkrinum og vendi og snari heiminum í høvdinum, meðan eg berji meg gjøgnum enn eitt herðindi av svøvnloysi og enn eina vøkunátt í amerikansku oyðimørkini"

Soleiðis byrjar nýggja skaldsøgan hjá Paul Auster *Mand i mørke.*

Søgan snýr seg um 72 ára gamla August Brill, ein pensjóneraður bókaummælari, sum býr í amerikanska býnum Vermont, saman við 47 ára gomlu dóttur síni, Miriam, og 23 ára gomlu abbadótturini Katya. Hvør sær hava tey øll upplivað eina stóra vanlukku, sum vit ikki skulu avdúka her. Tí eru tey øll í svárari sorg, og tí liggur August Brill og vendir sær svøvnleysur.



*Við nýggju bók síni "Mand i Mørke" vendir Paul Auster sær ikki bara til gamlar, svornar Auster fjepparar*

### Maðurin í holuni

Fyri at sleppa undan minnunum og marruni, finnur August Brill uppá eina søgu um ein mann, sum eitur Owen Brick, sum vaknar í eini holu og finnur út av, at USA er beint í einum borgarakríggi. Brick fær síðani boð um at finna mannin, sum hevur skyldina av kríggnum og tess vanlukkum – og tað er also August Brill, sum jú hevur funnið uppá søguna.

Hetta ljóðar jú sum Paul Auster, tá hann líkist sær sjálvum mest. Kortini verður Auster ikki so fløktur hesuferð, sum hann ofta verður, tá hann byrjar at fortelja søgur um at fortelja søgur …

Í veruleikanum er søgan rættiliga logisk, tá tú hugsar um, at Brill sjálvsagt ikki hevur hug at liva, og sjálvandi kunnu ræðuleikarir í gerandisdegnum ikki haldast burtur frá íspunnum søgum, har tú ikki kanst ímynda tær eitt Amerika, sum ikki er í kríggi – sum ein av persónunum í bókini tekur til.

### Lív og filmur

Sum frá líður, sleppur Brill ikki undan at hugsa um tað, sum er hent honum og familjuni. Í hesum brotunum verður *Mand i mørke* ikki bara ein sera beinrakin lýsing av og viðmerking til Amerika í kríggi. Her verður bókin eisini ein kenslulig lýsing av sambandinum millum abban og abbadóttrina, sum saman brúka næturnar at sita og hyggja at svørt/hvítum filmsklassikarum, sum sjálvsagt innihalda tematisku leiðina, sum *Mand i mørke* fylgir.

Eins og Katya einaferð ger vart við:

"Í hesum klippinum fáa vit eina mynd av einum heilum samfelag, sum livir á eggjuni á eini vanlukku"

Tað gera vit eisini í bókini, sum ikki bara vendir sær til svornar Auster fjepparar.

Søgan um, hvussu ein gamal maður roynir at sannføra dóttur sína, seg sjálvan og abbadótturina um, at "lívið er eitt vónbrot. Men eg ynski eisini, at tú skalt vera eydnurík" er gyklandi lesnaður hjá øllum, sum gera sær tankar um kríggj og kærleika í heiminum, vit liva í.

Tað ger tað heldur ikki verri, at sum so ofta fyrr megnar Auster at halda lesaranum fast í øgiligum spenningi frá fyrstu síðu.

## Deyðadømdur kærleiki

Eva Jørgensen, *Vi ses i morgen*, Rosinante, 2007

Tey høvdu kent hvønn annan, síðani tey vóru skúlabørn og høvdu verið starvsfelagar í fleiri ár. Tí fnisaðu vinirnir eitt sindur, tá journalisturin og sjónvarpskvinnan Eva Jørgensen og starvsfelagin Steffan Knudsen brádliga uppførdu seg sum nýforelskaðir tannáringar. Skjótt var brúdleyp á skránni, og 40 ára gamla Eva Jørgensen fann út av, at hon var uppá vegin fyri fyrstu ferð.

Hálvan annan mánað seinni fær Steffan Knudsen at vita, at hann er deyðiliga sjúkur. Og 10 mánaðir eftir at sonur teirra varð føddur, doyr Steffan í 2006 bert 44 ára gamal.

Í bókini *Vi ses i morgen* minnist Eva Jørgensen, hvussu sjúkan umskapaði eitt paradís av forelskilsi og kærleika til eina marru av skuldarkenslu og deyðsangist.

– Vit sova í smáum, bangnum rykkum. Tora ikki at geva okkum til svøvnin. Svøvnur er fravera. Frávera er deyði. Steffan skal doyggja. Maðurin, sum liggur og svevur við berum yvirkroppi við síðuna av mær, er við at hvørva. Eg kann nema við hann, men eg kann ikki halda honum fast, skrivar Eva Jørgensen einastaðni.

Kortini vil hon vera við, at bókin er ein kærleikssøga, tí sum hon sigur

– Kærleikin er viðbrekin. Tað mást tú sanna, tá tað menniskja, tú elskar mest av øllum, spakuliga broytist so nógv, at tú neyvan kennir tað aftur.

**ave**



*Eitt paradís av forelskilsi verður umskapað til eina marru av deyðsangist í bókini "Vi ses í morgen" eftir Eva Jørgensen*